**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 2. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Trý størv sum 2. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys, til setan 1. juni 2003.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Luttaka í dagliga viðlíkahaldinum sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer) ella vinnubræv sum Skipsmaskinistur á 2. stigi (STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer)
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 24. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 2. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnibrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2003.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Agnar Poulsen, samskipara.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Pedagogur til dagstovnin Kurlu

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 35 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1. apríl 2003 ella eftir avtalu.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Duritu Dam, leiðara, tlf. 353500 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Kurlu, Sundsvegur 3, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mars 2003.

**Dagstovnurin Kurl@**

Í Dagstovninum Kurlu ganga 34 børn.

Stovnurin er skipaður við einari barnagarðsstovu og einari vøggustovu.

Á stovninum starvast 9 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

www.torshavn.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3514
**Navn:** Sp/f RSP
**Adressa:** Postsmoga 144, 700 Klaksvík

**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 15.02.2003
**Viðtøkudato:** 15.02.2003
**Kapitalur**: Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Marianna Poulsen, Stangaskákið 19, 700 Klaksvík.
**Stjórn**: Marianna Poulsen, Stangaskákið 19, 700 Klaksvík
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** : Sp/f AB Grannskoðan, Sleipnisgøta 12, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 15.02.2003 - 31.12.2003
**Endamál**: Endamál felagsins er at eiga og umsita fastogn og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 7 mars 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2492, P/F Bergfrost, 530 Fuglafjørður.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini**: Kristin Rasmussen, Berjabrekka 197, 100 Tórshavn (formaður) og Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Líggjas í Bø, Skáltavegur 21, 700 Klaksvík (formaður) og Jens Kári Wilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2976, Sp/f FiJo, 700 Klaksvík.

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Ingrid Johannesen, Geilin, 700 Klaksvík.
**Innkomin sum stjóri:** Jógvan Johannesen, Geilin, 700 Klaksvík.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*
*Kristin Balle*

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skrivari til kommunalu skattakærunevndina

Tórshavnar kommuna søkir eftir skrivara til kommunalu skattakærunevndina fyri Tórshavnar Økið at byrja skjótast til ber.

Skattakærunevndin fyri Tórshavnar Økið fevnir um Tórshavnar, Kirkjubøar, Hests og Nólsoyar kommunur. Nevndin viðger kærur um álíkningina frá borgarum og fyritøkum.

**Arbeiðsuppgávur**
- Ábyrgd av dagligu leiðsluni og menningini av skattakærudeildini
- At lýsa og viðgera kærur frá borgarum og fyritøkum og geva kærunevndini tilmæli um avgerðir
- At tryggja at umsitingin hevur eitt gott samskifti við kærarar og stovnar
- Luttaka í gerð av avgerðaryvirliti o.ø.
- Ansa eftir at lógir, reglugerðir og avgerðir o.a. verða fylgdar.
- Umframt arbeiðið hjá skattakærunevndini verður eisini talan um ymiskt annað arbeiði hjá Tórshavnar kommunu, har uppgávurnar eru ymiskar og fjølbroyttar, herundir at ráðgeva fyrisitingini

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, sum t.d. cand.merc., cand. jur., ella útbúgving sum merkonom í skattarætti/ roknskapi ella líknandi
- vera fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera málsøkjandi
- hava góð leiðslu- og samstarvsevnir umframt mennandi leiðslustíl
- duga at fyrisita og samskifta, bæði í skrift og talu
- hava virðing, fatan fyri og hegni at samstarva við ta politisku skipanina og hava kunnleika til tær treytir, sum eru galdandi í einari slíkari fyrisiting

Tað kann verða ein fyrimunur, um umsøkjari hevur royndir á skattaøkinum, og/ella umsitingarligar royndir innan almenna ella privata umsiting.

**Bjóðað verður**
Eitt sjálvstøðugt, ábyrgdarfult og fjølbroytt starv við spennandi avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga. Leiðarin kemur at standa fyri eini deild við tveimum starvsfólkum, umframt leiðaran.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2003, viðmerk "Skrivari til kommunalu skattakærunevndina"

SNARSKIVAN

## Jørð í Sandavági til sølu

Um hóskandi boð fæst er matr. nr. 168 og 164 við ástandandi summarhúsi til sølu. Samlað vídd er 33.435 m².

**Tlf. 424155**



## MS - Miðnámsskúlin í Suðuroy

"framtíðin kemur ikki av sær sjálvum"







Vel MS. Nem alskyns vitan
og gev tær sjálvum
møguleika til framtíðina

MS - skúlin í nærumhvørvinum
við hugflogi og góðum samanhaldi

Umsóknarfreistin er 15. mars.

Einstakar lærugreinir.
Ert tú tilkomin? Hevur tú hug og stundir
til at víðka sjónarringin?
Miðnámsskúlin bjóðar tær møguleika at lesa
lærugreinir sum stakgreinalestur, eisini fram
til fult studentsprógv.
Laga lesturin til tín egna tørv og møguleika

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til MS
Tel. 373622 ella 374011 • www.midnam.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Vatnmeistari til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir eftir vatnmeistara.Umsøkjarin, ið skal hava maskinmeistara- ella líknandi útbúgving, fer undir leiðslu av teknisku deild,at røkja hesar uppgávur:
- standa fyri og hava rakstrarábyrgd av viðlíkahaldi og útbygging av vatnkervinum
- hava dagligu leiðsluna av vatnverkinum um hendi
- hava umsitingarligu ábyrgdina av amboðum, maskinum og húsum, ið eru knýtt at vatnverkinum
- luttaka í skráseting av vatnleiðingum

**Fakligar eginleikar**
Kunnleiki til vatnleiðingsarbeiði er eitt krav, herundir veg- og anlegsarbeiði umframt asfaltarbeiði. Umsøkjarin skal hava koyrikort. Eisini krevst kunnleiki til teldutøkni, t.d. teldukoyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, umframt at vera málsøkjandi og fyrikomandi. Neyðugt er at kunna taka skjótar og rættar avgerðir og at hugsa rationelt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett við 1 árs royndartíð, løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Viggo Christiansen, deildarleiðara ella Boða Haraldsson, býarverkfrøðing, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mars 2003.

**Vatnverkið**

Vatnverkið heldur til í Tórfinsgøtu 21, og har starvast 9 mans.

Í kommununi eru 8 reinsiverk: í Villingadali, Havnardali, Kollafirði, Argjum, Kaldbak, Kaldbaksbotni, Sundi og Syðradali.

Tórshavnar kommuna hevur eina samlaða vatngoymslu á 1.400.000 m3. Árliga nýtslan í kommununi er 3.500.000 m3.

Høvuðsarbeiðið á vatnverkinum er umvæling av verandi vatnleiðing, og nýgerð í samband við nýggjar útstykkingar v.m.

www.torshavn.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


# VÁR OG SUMMAR





Jakki regn- og vindtættur
Prísur 958,-

Prísur 1.788,-

Jakkar – prísir frá 548,-

NÝGGJAR TROYGGJUR



Troyggjur við knappum prísur 798,-

Prísur 548,- Við longum ermum

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgota 21 - Tel 315315

Sosialurin i Sosialurin